# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samveldi á vegamóti

Sunnudagin tann 25. mars varð í Berlin stórt hátíðarhald, tí ES er vorðið fimti ár í hesum døgum. Europa er nógv broytt, síðan Felagsmarknaðurin, sum ES upprunaliga nevndist, varð stovnaður við tí sonevnda Rom sáttmálanum. Teir politikkarar, sum gingu á odda, mest týskarar og fransar, høvdu upplivað annan heimsbardaga. Nú stóðu teir við sundurbumbaðum býum, vánaligum búskapi, fátækdømi og hóparbeiðsloysi. Marshallhjálpin gjørdi góðan mun, men henda búskaparliga hjálp kravdi samstarv.

Tað ættarlið, sum tók við politiska valdinum á meginlandinum, var sannført um, at afturvendandi kríggj millum ávís lond í Europa var ein av mongum forðingum fyri búskaparligari og sosialari menning á meginlandinum. Í staðin fyri kapping landana millum skuldi skapast samstarv, fyrst og fremst búskaparligt samstarv. Hetta kundi best fremjast við at taka burtur allar handilsforðingar, og soleiðis byrjaði alt hetta við einari tollsamgongu, sum eftir fimti árum er vorðið til eitt umfatandi politiskt og búskaparligt samstarv – til ES, sum er eitt politiskt samveldi. Hetta samveldi telur nú 24 limalond og er vorðið ein týðandi búskaparligur og politiskur leikari á altjóða leikvøllinum.

Men tað er ikki enn eydnast at stovna eitt veruligt europeiskt stórveldi, sum megnar at matsja USA, soleiðis sum stjórnirnar í limalondunum ynskja tað. Hetta mál vinnur av ymsum orsøkum ikki frama hjá fólkasløgunum í ES. Hví vinnur hetta ynski ikki frama? Orsøkin tykist vera, at fjøldin av fólkinum í limalondunum óttast miðsavnan, skrivstovuveldi og tørvandi fólkaræðiligt eftirlit við leiðslu á øllum stigum. Her fer sostatt í Europa ein tilgongd fram, har fólkaræðið í einstøku limalondunum styrknar, gjøgnumskygnið batnar, men tilgongdin í ES samveldinum er tann øvugta. Her verða stórar avgerðir tiknar og enntá lóggivið handan stongdar dyr. ES hevur sostatt eitt demokratiskt hall, sum gevur alla orsøk til at vera á varðhaldi.

Er so einki gott og jaligt við hesum samveldi? Jú so avgjørt. ES hevur megnað at tryggja longsta friðarskeið í europeiskari søgu, liberaliseringarnar av samhandlinum eru ein av mongum orsøkum til búskaparligu framgongdina sum heild og mannarættindi og humaniterar verkætlanir so sum stríð móti hungri og neyð, deyðarevsing o.m.a. standa ovast á europeisku dagsskránni. Men hetta er sjálvsagt ikki nóg mikið hjá teimum, sum síggja fyri sær eina skjóttnærkandi framtíðar heimsmynd, har USA, Kina og India ráða heiminum. Her skal eitt fjóðra stórveldi á vøllin. Hetta stórveldið er ES og hetta krevur eina ES yvirvøld yvir landastjórnunum, og hetta krevur eina felagseuropeiska hermegi, nakað, sum ræðir nógv vanlig fólk í øllum ES londum. Hvussu hendan tilgongd endar veit eingin enn. Men hon byrjaði sunnudagin við Berlinyvirlýsingini, eitt yvirlit yvir uppskot, tiltøk og ætlanir, ið við tíðini skulu føra til eitt veruligt felagseuropeiskt stórveldi. Ein áhugaverdur spurningur er sjálvsagt, hvar Føroyar flóta í hesum meldri. Henda spurning venda vit aftur til.

**Sosialurin**

## Harðskapur og undirhald

**FIROUZ GAINI**
Ungdómsgranskari



Harðskapur er undirhald í dag. Syrgiligt, men veruleiki. Og harðskapurin er allastaðni – eisini í Føroyum. Hendingin í miðbýnum í Havn tíðliga sunnumorgun (25. mars) kom tíverri ikki sum nakað sjokk. Tað hava verið nógv harðskapsmál síðstu árini. Tað mest skelkandi og ófatiliga í hesum máli er, at hvørki løgreglan ella onnur fólk í býnum siga seg hava sæð nakað til bestialsku hendingina. Tað mest ræðandi er at hoyra, at fólk ikki tora at fortelja, hvat ið tey síggja. Tað sigur seg sjálvt at ung, ið hoyra til minnilutar av ymsum slag, ikki vilja fara út um náttina, um tey kunnu blíva avbukað uttan at nakar í nánd hjálpir teimum.

Tað, ið vit hoyra um í fjølmiðlunum, er bara toppurin av einum ísfjalli. Harðskapur er vaksandi trupulleiki, ið fólk flest vita um, men lítið og onki verður gjørt fyri at venda neiligu gongdina. Nógv børn og ung eru fyri harðskapi hvønn dag – í barnagarði, skúla, heima og aðrastaðni. Tó eru rættiliga fá, ið alment tala at hesum gerandis-harðskapi. Ofta verður harðskapurin sagdur at vera meinaleysur og partur av spæli hjá børnum, men tað er grovasta lygn. Eisini verður ofta sagt, at tey happaðu og bukaðu sjálvi hava skapt trupulleikarnar, ið tey liva við. Sostatt verður trupulleikin ikki nakað, ið samfelagið skal gera nakað við.

Harðskapur er undirhald í okkara samfelagi í dag, tí filmar og telduspøl romantisera flestallar formar fyri harðskapi. Best umtóktu telduspølini geva leikararnar bonusstig fyri at myrða og knúsa tilvildarlig fólk, ið síggjast á gøtuni. Málið er at skjóta frá hond, líkamikið hvør, ið offur verður. Onki mark er fyri harðskapinum, ið øll frítt kunnu finna sær á alnetinum. Veruligar myndir úr gøtubardøgum, hópneyðtøkum, hernaðarligum álopum o.s.fr., eru lagdar út til tey, ið hava áhuga fyri hesum. Harðskapurin verður sostatt óbeinleiðis viðurkendur og partur av gerandisdegnum hjá sera nógvum persónum. Rasisma er eisini partur av nógvum av undirhaldinum í miðlunum, ið skapa ræðumyndir av etniskum og átrúnaðarligum bólkum kring heimin.

Tú lærir ikki hvat, ið er rangt og rætt í telduspølunum; tú lærir ikki at seta mørk, at virða medmenniskju, at hava samkenslu, at seta teg í støðuna hjá øðrum, og als ikki, at halda teg burturi frá líkamligum harðskapi. Harðskapurin verður tvørturímóti lýstur sum fína loysn, ið kann hjálpa tær fram í lívinum. Øll eru fíggindar – uttan tú og tíni nærmastu. Tí er sera avgerandi at fáa veruliga uppaling frá familju og skúla, men tíverri eru alt fleiri ung, ið ikki hava nakað gott samband til vaksin fólk, ið kunnu læra frá sær. Alt fleiri sokallaðir “truplir” næmingar eru í skúlunum og ongin veit veruliga hvat, ið skal gerast fyri at fáa hesi á rættari kós. Líkasæla er mest vandamikla loysnin, tí tað inniber at samfelagið letur standa til og at harðskapurin sleppur at blóma víðari, uttan at bølmennini missa tað vald, ið teirra harðskapur gevur.

## Styrkið tolsemið og javnrættindi

**TÍÐINDASKRIV**
*Suðurstreymoyar Javnaðarfelag*

Týskvøldið 27. mars 2007 hevði Suðurstreymoyar Javnaðarfelag aðalfund.

Fundarfólkið umrøddi m. a. tann skelkandi rasistiska tilburð, ið fór fram í Havnargøtum sunnumorgunin, har vit enn einaferð upplivdu, at ein ungur medborgari var útsettur fyri einum grovum álopi og harðskapi, einans tí hann onkursvegna er annarleiðis enn meirilutin. Fyri stuttum var ungur havnarborgari álopin vegna kynsligan samleika. Hesaferð var húðarlitur umbering hjá valdsmonnum.

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag átalar og harmast slíkar tilburðir. Tað er okkara innasta sannføring, at vit øll hava sama rætt at liva og virka – uttan mun til húðarlit, trúðarliga sannføring ella kynsligan samleika.

Og tað er okkara sannføring, at tað er okkara felags ábyrgd, at vera á varðhaldi og verja rættin hjá tí einstaka at liva og virka.

Vit ásanna, at ikki minst politiska umhvørvi – løgting, landsstýri, kommunalir myndugleikar, politiskir flokkar og onnur, mugu samstarva fyri at berja niður teir fordómar og ta snævurskygni, ið er upprunin til hetta happingarlag.

Vit ásanna, at áhaldandi upplýsing er neyðug fyri at fyribyrgja at slíkt kemur fyri í okkara samfelag.

---

Væl av fólki var á fundinum og lívligt orðaskifti var um politisku støðuna. Í samband við aðalfundin greiddu býráðsumboðini Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov frá um arbeiði í býráðnum og ætlaninar framyvir.

Á aðalfundinum stóðu Katrin Gaard og Ann-Elisabeth Joensen fyri vali. Báðar vóru afturvaldar. Bente Kjær var nývald fyri Joan Ziskason, sum ikki ynskti at halda fram í nevndararbeiðinum. Afturat teimum sita Kári Mortensen og Bergur P. Dam í nevndini. Eykalimir eru Elsba Olsen og Ragnhild Olsen.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar. Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.